# Føroyskur samskipari í donskum gulleggi

**Suni á Dalbø hevur á Aalborg Universitet staðið fyri slóðbrótandi verkætlan, sum nú hevur givið ein veldugan sáttmála við General Electrics**

PATENT
*Jákup Mørk*

Sáttmálin varð mikudagin undirskrivaður í operahúsinum í Danmark, og tað tykist ógvuliga sannlíkt, at talan er um eitt satt gullegg, sum við hesum er komið undan kavi.

Í stuttum snýr avtalan seg um ein nýggjan hátt at avdúka eina serliga hjartasjúku - Lang QT syndrom - ið er sera trupul at staðfesta, meðan sjúkuberarin enn er á lívi. Tríggir danskir lesandi komu sjálvir fram á ein nýggjan hátt at staðfesta sjúkuna, og tað er úrslitið av hesum ,sum nú er selt til General Electrics. GE er ein av størstu fyritøkunum í heiminum, og ein partur av virkseminum er at menna sjúkrahústøkni.



*Suni á Dalbø hevur í starvi sínum á Aalborg Universitet verið samskipari í avtaluni, sum er tann størsta av sínum slag í danskari søgu*

Leikluturin hjá Suna hevur so verið at virka sum samskipari í ætlanini, soleiðis at hann í fyrsta lagi hevur tryggjað AAU einkarætt til granskingarúrslitini og víðari arbeiðið í hesum. Og tað eru hesi rættindi og úrslit, amerikanski medicinal-giganturin nú hevur keypt seg til. Hetta soleiðis at tey í framtíðini kunnu gera hetta til ein part av sínum EKG-tólum.

### Millióna-upphæddir

Júst hvussu nógvur peningur er í avtaluni, ber illa til at fáa staðfest, men í tíðindatilfarinum, sum varð sent út undan undirskrivingini, verður staðfest, at talan er um størstu avtaluna í sínum slag í danskari søgu.

Men í øllum førum verður roknað við, at talan verður trísiffraðar millióna-upphæddir, sum kunnu fáast burtur úr hesum. Fyribils hava Universiteti og teir tríggir lesandi uppfinnararnir fingið eina trivaliga milliónaupphædd burturúr, men verður talan so eisini um væntaðu søluinntøkurnar, verður talan um heilt stórar upphæddir, sum ætlandi floyma tvørtur um Atlantshavið. Bæði til uppfinnararnar sjálvar, men so sannniliga eisini til Universitetið, sum seinnu árini hevur ment seg til eitt tað fremsta í norðanlondum, tá um ræður vinnuliga gransking.

## Eingin semja enn

Mikumorgunin varð farið undir semingsroyndina, nú Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið enn ikki eru komin ásamt í royndunum at gera nýggjan sáttmála partanna millum.

Tað eru Jógvan Amondson og Alfred Petersen, sum aftur hesa ferð skulu royna at mýkja partarnar, men við evstamark okkara var framvegis einki at frætta frá samráðingunum.

Slíkar semingsroyndir kunnu taka upp í tvey samdøgur, so tað kann væl ganga nakað av tíð afturat, áðrenn eitt semingsuppskot verður lagt fyri partarnar.

Sáttmálin hjá Starvsmannafelagnum gekk út 1. oktober. Starvsmannafelagið hevur áður boðað frá, at tey sum minsta krav vilja hava eina regulering, sum svarar til inflatiónina seinasta hálva triða árið. Fíggjarmálaráðið hevur hinvegin sagt, at tey vilja hava eina sonevnda null-loysn.

**-mørk**

## Skatturin

*Richard Danielsen*

Tað hevur verið nógv skrivað og sagt um skattalættan. Nú ásannar sjálvur fíggjarmálaráðharrin at hesin lætti verður etin upp av øðrum avgjøldum. Hvussu verður hetta nú gjørt, jú við millum annað at leggja meiravgjald á vektgjaldið av bilum og við at tvíhalda um oljuavgjaldið.

Okkum øllum kunnugt er tann vanligi skatturin soleiðis uppbygdur at tann, sum hevur høga inntøku fær meiri skatt enn tann láglønti. Nú verður tað, sum manglar í landskassanum tikið inn-aftur gjøgnum bakdyrnar á tann hátt, at hin láglønti má gjalda líka nógv sum tann hálønti, við tað at tað verður tikið inn við vektgjaldi og oljuavgjaldi. Hin hálønti merkir tað nóg illa, meðan hjá tí láglønta er hetta ein merkandi eykabyrða. Soleiðis er hetta skrúða saman, er hetta rætt. Mangur við mær man undrast stórliga á hendan politikk.

**VIÐMERKINGAR**

# Lógin og náðin

**Ebbedinna Jacobsen**
*Kollafirði*



Lógin var ein heild, samansett av hesum trimum:

1. Moralboðum
2. Seremoniboðum og
3. Sevil- ella samfelagsboðum

Harrin Jesus varð føddur undir lógini, doyði fyri alla lógina og keypti okkum leys frá allari lógini, ikki bert seremoni- og sevillógini, men eisini frá morallógini. Hetta merkir ikki, at Hann tileinkisgjørdi ella forkom lógini, tí hon er heiløg, rættvís og góð (Róm. 7, 12.14), men Hann uppfylti hana fyri okkum, sum trúgva á Hann. Men sum grundarlag til rættvísgering tók Hann hana alla burtur, tí hann er "endi lógarinnar, hvørjum tí til rættvísi, sum trýr" (Róm. 10,4). Nú eru vit, sum trúgva á Kristus, "ikki undir lóg, men undir náði (Róm. 6,14). Nú hevur Hann skrivað lóg Sína í hjørtu okkara og við Anda Sínum í okkum "gjørt okkum før fyri at vera tænarar hjá nýggjum sáttmála, ikki bókstavs, men Anda; tí bókstavurin drepur, men Andin ger livandi" (2. Kor. 3,6).

Lógin hekk sum eitt svørð yvir høvdi okkara, tá ið vit vóru undir henni, men nú er náðin, "lóg Kristusar" (Gal. 6,2) og lóg kærleikans, drívkraftin, sum "venur okkum upp at avnokta gudloysi og hinar veraldligu girndir og liva sámiliga, rættvíst og gudiliga í heiminum, sum nú er, meðan vit vænta hina sælu vón..." (Tit. 2, 11-14). Vit eru nú lyft upp á eitt hægri støði enn "tænastu deyðans, sum við bókstøvum var høgd inn í steinar" og eru sett inn í "tænastu lívsins". Vit eru flutt úr "tænastu fordømingarinnar", inn í "tænastu rættvísinnar". Hin "gamli sáttmálin", sum hevði sína dýrd, svann burtur í Kristusi og er nú avloystur við "nýggja sáttmálan" í blóði Hansara, sum er mangan størri í dýrd og varir við. (2. Kor. 3, 1-18). Hebrearabrævið sigur tað soleiðis: "Táið Hann sigur: "Nýggjan (sáttmála)" - hevur Hann dømt hin fyrra at vera gamlan; men tað, sum gamalt verður og eldist, er tætt við at hvørva" (Hebr. 8,13).

Tí ber ikki til at siga, at "boðlógin og fyriskipanir hennara" í Ef. 2,15, bert var "seremonilógin" og ikki morallógin! Nei, Harrin helt og doyði fyri alla lógina sum hon er og tók hana burtur sum grundarlag til frelsu!

Tí kann Paulus siga í Róm. 3, 31: "Gera vit tá við trúnni lógina til einkis? Minni enn so! Nei, vit staðfesta lógina!"

Lesið Sosialin -so eru tit við!